*Sjúk og gomul slept upp á fjall:*

# Eitt neyðarróp frá sjúklingi uttan heimahjálp

*-Vit, sum eru gomul og sjúk og búgva heima, hava so sanniliga brúk fyri heimahjálp. Tað er einki minni enn ein vanlukka fyri okkum, at heimahjálpirnar ikki sleppa til arbeiðis og eg fari tí inniliga at heita á partarnar í málinum um at finna eina semju.*

Hetta sigur Stig Rasmussen, pensionistur og heimabúgvandi sjúklingur. Hann var herfyri sendur heim av sjúkrahúsinum vegna plásstrot og hevur síðani fingið vitjan av heimahjálp hvønn dag.

-Konan er mær til stóra hjálp, men hon hevur liðagikt og hevur ikki orku til at taka sær nóg nógv av mær og tí kann eg rætt og slætt ikki vera heimahjálpina fyriuttan. Eg kenni tí hesa ósemjuna á bæði kroppi og sál og fari at biðja bæði landsstýrið og fakfeløg um at fáa ein enda á hesi ósemju.

Stig Rasmussen, sum er 75 ár, heldur ikki, at landsins myndugleikur kunnu loyva sær at sleppa teimum gomlu og sjúku upp á fjall.

Hetta er eitt neyðarróp sigur hann í eini viðmerking til ósemjuna millum landsstýrið og heimahjálparnar.

jan

*Løgmaður um oljuálitið:*

# Eitt vælaverk



Marita Petersen handaði í gjár fjølmiðlunum álitið frá oljuráðleggingarnevndini. Eisini hava allir flokkar á tingi fingið álitið.

Løgmaður sigur við Sosialin, at hon nú fer at kanna, um tað er politisk undirtøka fyri at leggja lógaruppskot og uppskot til samtyktar, um at føroyingar skulu fara undir oljuvinnu í ólavsøkutingsetuni, sum byrjar í næstum.

Løgmaður heldur tað er sera týdningarmikið at fáa eitt samt ting at leggja til brots í hesum máli. Hon er annars væl nøgd við álitið.

-Tað er eitt gott álit og eitt vælaverk. Nevndin hevur arbeitt skjótt og væl, og er talan um eitt álit, sum flest øll hava lætt við at lesa og skilja.

Upp á fyrispurning um løgmaður kennir seg vísan í, at møguleikar eru fyri eini oljuvinnu í Føroyum, nú hon hevur lisið álitið, sigur Marita Petersen, at tað ger hon og vísir til tær leitingarvánirnar kring Føroyar, og har nevndin er rættiliga positiv.

-Men tað verður eisini gjørt greitt, at tað eru viðurskifti, sum skulu vera í lagi, áðrenn vit byrja. Nú hevur nevndin skundað sær og kýtt seg og eg haldi ikki, at vit skulu leggjast oman á málið.

*-Kunnu vit rokna við, at forkanningar byrja í ár?*

-Tað dugi eg ikki at siga. Eg veit heldur ikki, um tað er politiskur meirluti fyri tí. Tað er rætt at fáa allar flokkar við í hetta málið. Men tað nýtist ikki at taka so drúgva tíð, tí álitið er longu eitt rættiliga greitt grundarlag at taka eina politiska støðu úr frá.

*-Tvs. at tú útilokar ikki, at forkanningar kunnu byrja longu í ár?*

-Eg útiloki einki, men hinvegin sigi eg heldur ikki, at tað ber til.

jan





BILPAKKAR
4 fólk í bili
Torshavn - Bergen - Torshavn
I háárstíð
Prísir úr kr. 4.750.-
Tórshavn - Seyðisfjørður - Tórshavn
I háárstíð
Prísir úr kr. 5.790.-

TIL HETLANDS VIÐ SMYRLI
Fara leygardag, koma aftur mikudag
4 daga ferð við Bed&Breakfast
Prísir úr kr. 1.196.-
4 daga ferð við gisting á hotelli
Prísir úr kr. 1.636.-
11 daga ferð við gisting á hotelli
Prísir úr kr. 3.696.-

BUSSFERÐIR:
10.-14. og 21.-25.08.
2 gistingar á Shetland Hotel í Lerwick við morgunmati og útferðir við bussi
Prísir úr kr. 1.853.-

PAKKATILBOÐ:
11-daga ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili og gisting í summarhúsi
Prísir úr kr. 5.498.-

2 vaksin og 2 børn við bili
DANMARK:
Fanø Danland íbúð, 7 dagar
Prísur úr kr. 10.610.-
DanCenter-summarhús 7 dagar
I háárstíð:
Prísur úr kr. 11.880.-
Hermitage Hotel West, Esbjerg
7 dagar
Prísur úr kr. 11.880.-
NOREG:
Hallingen Høyfjellshotel í Gol
7 gistingar
v/fullum vistarhaldi
Fráferð: Hvønn mánadag
Prísir úr kr. 11.580.-

SIGL/FLÚGV
Føroyar - Danmark - Føroyar
(Um flogið verður úr Føroyum, skal ferðaavgjald á kr. 300,- leggjast afturat)
Í háárstíð fyri hvønn
Prísir úr kr. 2.068.-

MINI-CRUISE v/NORRÖNU
TIL NOREGS
Mánadag-mikudag
Prísir úr kr. 890.-
TIL ÍSLANDS
Mikudag-fríggjadag
Prísir úr kr. 1.210.-
TIL DANMARKAR
Fríggjadag-mánadag
Prísir úr kr. 1.290.-

Av tí at ferða-avgjaldið er hækkað verða **kr. 100,-** at leggja afturat fyri hvørt vaksið fólk!

Ja takk, eg vil fegin hava sendandi Smyril Line faldaran:
☐ Frítíðarbúðir og summarhús í Danmark
☐ Frítíðarferðir v/Smyrli til Hetlands
☐ Bussferðir til Hetlands
☐ Sigl / Flúgv

NAVN
BÚSTAÐUR
BÝUR/BYGD
Send fraklippingarseðilin í brævbjálva til
SMYRIL LINE
Postboks 370 - 110 Tórshavn

SMYRIL LINE - títt ferðasamband við útheimin
J. Broncksgøta 37
TLF. 15900
- nú eisini opið leygardag frá kl. 9.00-12.00